# NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

## Elmar Poulsen seksti ár



Í dag, 6. januar 2005 verður Elmar Poulsen í Klaksvík 60 ár. Elmar er sonur Marthu og Jóhannes Poulsen á Gørðum í Klaksvík og er næst yngstur av fimm systkjum.

Bert 13 ára gamal byrjaði hann at arbeiða hjá Eriki Olsen í Garðabúðini. Tá ið hann fór úr skúlanum, byrjaði hann sum ørindadrongur á skrivstovuni hjá P/F J.F Kjølbro og var har í nøkur ár.

Eitt skifti arbeiddi hann hjá P/F Stella og eina tíð á skrivstovuni á flakavirkinum á Kósini hjá P/F JFK. Í 1974 byrjaði hann at arbeiða í Norðoya Sparikassa, og har starvast hann enn tann dag í dag. So í oktober í fjør rundaði hann sín tríati ára starvsdag.

Hóast sína drúgvu starvstíð í Norðoya Sparikassa, hevur Elmar roynt annað enn at hava penn í hond. Millum annað var hann ein minniligan útróðrartúr. Menn søgdu, at veðrið fór at vera gott, men tað vísti seg at vera av tí allarringasta, har tað rullaði heilt illa. So hann rósti ikki ferðini.

Elmar hevur gingið á fjall í nógv ár og ger tað framvegis. Og í hoyna er hann altíð fúsur at hjálpa. Hann eigur hús við Kjalarvegin og brúkar nógva av sínari frítíð til at fríðka um uttanfyri.

At syngja dámar Elmari væl, og sungið varð nógv heima saman við systkjunum. Hann sang eitt skifti við í kórinum í Betesda. Annars plagar hann at vera á Zarepta og hjálpa til við barnalegunum. Hann hevur eisini verið í Íslandi fleiri ferðir og hjálpt til við barnalegunum á Austjørn.

Hjartaliga til lukku við 60 ára føðingardegnum og 30 ára starvsdegnum.

## Bodil Simonsen deyð



Sunnukvøldið 2. januar 2005 andaðist Bodil Simonsen í Klaksvík, 79 ára gomul. Hon var dóttir Annu og Jógvan Isaksen. Mamman var ættað úr Uppistovu á Trøllanesi, og pápin var úr Beiti í Lorvík. Hann var skipari og átti Atlantsfarið saman við Kjølbro. Bodil vaks upp og gekk í skúla í Klaksvík, og har búði hon alla sína tíð.

Hon giftist við John Simonsen, sum er sonur Giddu og Jens Christian í Toft, og tey búsettust á Gørðum. Tey bygdu sær hús har, men seldu tey nøkur ár seinni til kommununa, sum síðani hevur brúkt tey til læknaviðtaluhøli. Bodil og John keyptu í staðin húsini hjá Veru og Símuni á Gørðum, sum var beiggi John. Helst gjørdu tey tað, tí at hesi húsini lógu nærri við veg, og at tað tí var høgligari at røkja hýruvognskoyring haðani.

John hevur koyrt bil meginpartin av lívinum, og tað var so eitt av størvunum hjá Bodil at passa telefonina, tá fólk ringdu - alt samdøgrið - at biðja um hýruvogn. Frægari var, tá John seinni fór at koyra lastbil, tí lastbili var sjáldan brúk fyri á náttartíð.

Høvuðsstarvið hjá Bodil gjørdist at passa hús og heim og mann og børn og telefon. Men summi tíðarskeið arbeiddi hon úti. Hon stóð í handli í nøkur ár, og tá hon var komin nakað upp í árini, arbeiddi hon í nøkur ár á flakavirkinum á Kósini.

Hon var av arbeiðssamastu fólkum og hartil blíð at koma inn til. Nær knýtt at Brøðrasamkomuni gjørdi hon eisini sítt í Betesda og Zarepta. Hon hevði annars nóg mikið at takast við heima, tí børnini vóru ikki so fá. Bodil og John fingu hesi børnini:

Jógvan (Egga) er giftur við Áslu, f. Klein. Tey eiga børnini Mary, Bjørg og John.

Kjartan er giftur við Sonju, f. Høgnesen. Teirra børn eru Elsa, Bjørn, Bodil og Erla.

Anna er gift við Kára Müller. Tey eiga børnini Heidi, Beintu, Lars, Jonny, Ann Kari, Mariu og Randi.

Elisabeth er gift við Árna Jacobsen, og tey eiga Alex, Jónu og Rana.

Unn er gift við Elfinni Tróndheim. Teirra børn eru Lisa, Joan og Bogi.

Bjørn var yngstur av børnunum hjá Bodil og John. Hann doyði av sjúku 7 ára gamal.

Bodil og John fingu 16 langommu- og langabbabørn.

At gerast minnisveikur er sjúka, sum tykist at gera alt meira um seg í samfelag okkara. Bodil var eitt av teimum fólkunum, sum fyri nøkrum árum síðani varð rakt av hesi sjúku. Tey seinastu árini var hon á Norðoya Ellis- og Røktarheimi.

Fyri 30 árum síðan:

## Maskinmeistaraprógv í 1975



*Í januar 1975 tóku 18 maskinmeistarar prógv á Maskinskúlanum í Havn.*
*Aftara rað, f.v.: Jóhan P. Abrahamsen, Strendur, Súni Abrahamsen, Oyndarfjørður, Pætur Debes, Tórshavn, Regin Djurhuus, Hvítanes, Óli E. Erlingsson, Fámjin, Jóannes Eyðun Hansen, Funningur, Almfinn J. Jacobsen, Skálafjørður, Djon Djurhuus Jacobsen, Tórshavn, Jógvan H. Joensen, Miðvágur, og Karl Joensen, Syðrugøta.*
*Fremra rað, f.v.: Petur O. Larsen, Oyrarbakki, Jens O. Mikkelsen, Tórshavn, Mortan Mortensen, Tórshavn, Niels Jacob Olsen, Argir, Hjalmar N. Poulsen, Tórshavn, Ólavur Rubeksen, Tórshavn, Mannbjørn Vang, Miðvágur, og Hans G. Winthereig, Tórshavn.*

*Kelda: Myndaárbókin – árið ið fór 1975*

**Til abba mín**

## Hans Jacob Guldbro

**21. august 1925 – 1. januar 2005**

Abbi mín
Sangur brúsandi reinur
Umfevnir abba mín
Lívið er lív av nýggjum
Uttan pínu og sorg

Ljósastu einglar dansa
Syngja nýggjasta sang
Alheimsins faðir teg tekur
Inn í sin elskandi favn

Abbi mín syng tín vakra sang
Lyft upp ljósið
og skýn á hav

Saknurin kennist so tungur
Eg sakni abba mín
Men eg veit at abbi mín syngur
Syngur sín sang til Tín

**Símun**

**Dagurin**

**6. januar. Trettandi dagur jóla**. Trettandi verður hildin til minnis um vísmenninar úr Eysturlondum, sum komu at tilbiðja nýfødda jødakongin.

6. januar var í fornkirkjuni hildin sum føðingardagur Krists og var róptur Epifania Domino (opinbering Harrans). Tá teir í 4. øld semjast um 25. desember sum føðingardagin, verður 6. januar trettandi dagur jóla.

# Móttøka

## 25 ára starvsdagur



Fríggjadagin 7. januar kl. 14.00–17.00 verður almenn móttøka á SEV í Tórshavn í sambandi við, at Klæmint Weihe, stjóri, hevur starvast í 25 ár hjá elfelagnum SEV.

Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Elfelagið SEV**